Bjørt Samuelsen
Jóhannis Joensen
Johan Dahl
vegna Formansskapin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.
(Samsýningar og eftirløn løgtingsmanna o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"Løgtingslóg
um
nevnd at geva tilmæli um samsýningar og eftirløn o.a. til landsstýrisfólk og løgtingsfólk"

2. Í § 1 og § 2, stk. 1 verður "landsstýrismanna v.m." broytt til: "o.a. til landsstýrisfólk."

3. § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Nevndin verður vald, tá ið løgmaður í samráð við løgtingsformannin metir, at tørvur er á at seta nevndina."

4. § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Nevndin skal lata løgmanni tað í grein 2 nevnda tilmælið í seinasta lagi eitt ár eftir, at hon er sett."

5. Aftaná § 4 verður sett:
"§ 4 a. Samsvarandi ásetingunum í §§ 1-4 skal nevndin somuleiðis geva løgtingsformanninum tilmæli um samsýningar og eftirløn o.a. til løgtingsfólk.
Stk. 2. Løgtingsformaðurin almannakunnger tilmælið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi, tá ið nýtt løgting verður sett sambært § 9, stk. 2 í stýrisskipanarlógini eftir fyrst komandi løgtingsval.

Almennar viðmerkingar
Hetta lógaruppskotið er ein partur av tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt tilmæli um broytingar í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Víst verður til viðmerkingarnar í tí uppskotinum, sum er lagt við sum fylgiskjal 1: Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk, bls. 5.

Endamálið við uppskotinum er, at nevndin, sum ger tilmæli til løgmann um samsýningar og eftirløn v.m. til landsstýrisfólk, eisini og helst samstundis skal geva løgtingsformanninum tilmæli um samsýningar og eftirløn v.m. til løgtingsfólk. Á hendan hátt slepst undan, at setast skulu tvinnar ymiskar nevndir.

Hetta lógaruppskotið hevur ikki verið sent til ummælis, men er umrøtt við flokkarnar á tingi, eins og onkrar broytingar eru gjørdar í samráð við løgmann og Løgmansskrivstovuna.

Fimm nevndir hava síðan 2004 verið settar eftir løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Í juni 2005 læt fyrsta nevndin álit frá sær, í juli 2009 læt onnur nevndin álit frá sær, í desembur 2012 læt triðja nevndin álit frá sær, í juli 2017 læt fjórða nevndin álit frá sær, og í apríl 2021 læt fimta nevndin álit frá sær. Teir tríggir nevndarlimirnir hava verið samsýntir soleiðis, at formaðurin hevur fingið 40.000 kr. fyri arbeiðið og hinir báðir nevndarlimirnir 30.000 kr. hvør.

Bert álitið hjá triðju nevndini hevur, við tillagingum, verið grundarlag undir lógarbroyting, nevniliga løgtingslóg nr. 71 frá 19. mai 2014.

Hildið verður, eftir tí sum higartil er komið burturúr, at tað er ov kostnaðarmikið at seta nevndina fast eftir hvørt løgtingsval í mun til nyttuna av tí og arbeiðinum, sum stendst av útgreiningini.

Tí verður mælt til at rationalisera eitt sindur, og at seta inn í lógina, at nevndin bara verður sett, tá ið tað verður mett, at tørvur er á tí.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Hetta lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar í sær sjálvum, men víðkar einans heimildirnar hjá nevndini. Væntast kann, at kostnaðurin av nevndini veksur nakað, tá hon umframt til landsstýrisfólk eisini skal mæla til broytingar av samsýningunum til løgtingsfólk. Hinvegin er lagt upp til, at nevndin ikki verður sett aftaná hvørt val eins og nú, men at hon verður sett eftir tørvi. Tí verða neyvan útreiðslur av nevndini hvørt valskeið. Útreiðslurnar til nevndina verða býttar javnt millum Løgmansskrivstovuna og Løgtingið, tá nevndin viðger samsýningar til bæði landsstýrið og Løgtingið.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Heitið á lógini verður broytt, so hon bæði fevnir um løn og eftirløn o.a. til landsstýrisfólk og løgtingsfólk. Somuleiðis verður nýggj § 4 a sett inn, sum ásetir, at sama nevndin, sum løgmaður velur at gera tilmæli um samsýningar og eftirløn til landsstýrisfólk, eisini á sama hátt skal geva løgtingsformanninum tilmæli um samsýningar og eftirløn til løgtingsfólk.
Í tann mun, at nevndin mælir til broytingar í viðurskiftunum hjá løgmanni, kemur hon við sama tilmæli viðvíkjandi løgtingsformanninum, soleiðis at hesi altíð eru javnsett í so máta, eins og lagt er upp til í uppskotinum til løgtingslóg um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk.

Í § 1 og § 2, stk. 1 í galdandi lóg verður gjørd málslig rætting, nú almennu starvsheitini eru broytt frá landsstýrismenn til landsstýrisfólk, tá tosað verður um hesi undir einum sum ein hóp.

Í § 3 í lógini verður ásett, at nevndin verður vald eftir tørvi, t.d. um lønarviðurskiftini annars í samfelagnum broytast munandi ella arbeiðsumstøðurnar broytast. Í § 4 verður tíðarfreist sett fyri, nær tilmælið skal handast.

Til § 2
Gildiskomuáseting. Lógarbroytingin fær virknað aftaná komandi løgtingsval.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Bjørt Samuelsen Jóhannis Joensen

Johan Dahl

Hjáløgd fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk.